TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ 24. februar 2011	Blað nr.: **8897**
	Formansins merki:

GERÐABÓK

Dato: 24. februar 2011 kl. 17.30
Stað: Býráðssalurin
Málsnr:27/11-46/11

FUNDARLEIÐARI:
Heðin Mortensen

VIÐ LUTTØKU AV:
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal
Jógvan Arge
Rúni Djurhuus
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Inga Dahl

LUTTÓKU IKKI:
Maria H. Olsen, í farloyvi
Sjúrður Olsen, í farloyvi

LUTTÓKU EISINI:
Magnus Dam
Jóan Petur Hentze

SKRIVARI:
Ingibjørg Berg

PROTOKOLLFØRARI:
Janus Isfeldt

MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.

30/11 **2011-0172**

Sjúrður Olsen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger b□ráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

Býráðið 24. februar 2011: Samtykt.

31/11 **2011-0217**

Mál beind í nevndir

Býráðið 24. februar 2011: Tikið til eftirtektar.

32/11 **2011-0358**

Val av limum og varalimum í stýrið fyri Lágargarð fyri 2 ár.

Hesir limir standa fyri vali:

Fastir limir:	**Varalimir:**
Ingeborg Godtfred	Áki Andreasen
Marianna Heinesen	Beinta Øssursdóttir
Inga Dahl	Marita Hentze

Býráðið 24. februar 2011: Vald vóru

Fastir limir:	**Varalimir:**
Ingeborg Godtfred	Áki Andreasen
Marianna Heinesen	Beinta Øssursdóttir
Inga Dahl	Marita Hentze

33/11 **<u>2011-0328</u>**

<u>Val av limi í leiklistaráðið í 3 ár</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært lógini setur landsst□rismaðurin eitt leiklistaráð við 7 limum, og skal Tórshavnar b□ráð tilmæla ein ráðslim.

Í kunngerðini um leiklistaráðið er ásett, at limirnir í leiklistaráðnum skulu hava kunnleika til mentan og pallist.

Býráðið 24. februar 2011: Valdur varð Jóan Petur Hentze.

34/11 **<u>2009-2301</u>**

<u>Umsókn frá Kaj Andreasen & Co um at keypa matr. nr. 1nd, Hoyvík</u>

Lýsing av málinum - samandráttur:
Kaj Andreasen & Co søkir um at keypa matr. nr. 1nd, Hoyvík, at leggja saman við verandi ogn teirra matr. nr 1æg, Hoyvík (Brekkutún 7).

Sambært umsøkjaranum er endamálið við keypinum er at skapa rúmd til tann partin av útigoymslu teirra, ið ikki rúmast á matr. nr. 1æg.

Matr. nr. 1nd, Hoyvík er 1.039 fermetur til støddar. Grundstykki liggur sambært byggisamtyktini í C1-øki "Tøtt miðstaðarbygging".

Tilmæli:
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til at málið verður beint í viðkomandi faknevnd(ir) til ummælis.

Deildarleiðarin á løgdeildini mælir eisini til, at ein møgulig avgerð um at játta umsóknini verður treytað av, at viðurskiftini viðvíkjandi stuðlamúrinum móti Vegnum Langa (sí mál nr. 2003-1537) verða fingin í rættlag.

Fíggjarnevndin 28. oktober 2009: Samtykt at beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina og teknisku nevnd.

Viðmerkingar frá teknisku deild:
Nevnda umsókn, dagfest 10. september 2009, viðlagt kort sum vísir økið.

Um kommunan letur økið frá sær, eigur kommunan at treyta sær við tingl□sing á skeytið, at kommunan óhindrað sleppur fram at høvuðskloakkini frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, ið liggur undir hesum øki. Somuleiðis eigur kommunan at tryggja sær, at teir skaðar, sum umsøkjarin hevur elvt til í sambandi við at grivið er ov tætt uppundir Vegin Langa, verða afturgjørdir av umsøkjaranum, áðrenn ein møgulig søla kann koma uppá tal.

Eisini eigur kommunan at treyta sær við tingl□sing á skeytið, at kostnaðurin fyri møguliga umlegging av høvuðskloakkini í sambandi við møguliga bygging á økinum, skal berast av eigaranum av stykkinum.

Tórshavnar kommuna kann heldur ikki lata økið frá sær, fyrr enn tað er avklárað við SEV, um tansformatorstøð skal setast á økið.

Skráin niður frá stykkinum er inni á matrikul, sum Skógrøktin eigur. Hesin er brattur og
er lopin tvær ferðir. Nú er loksins plantað har, og tað veksur.

Áðrenn Tórshavnar kommuna letur lendið frá sær, so eigur Skógrøkt landsins sum hevur eina verkætlan í Dalinum Langa, saman við Lions, um planting av økinum, og sum næsti granni eigur at verða hoyrdur.

Bygging á økinum kann ikki fara fram uttan góðkenning frá friðingarmyndugleikunum.

Víst verður eisini til viðmerkingina frá deildarleiðaranum á løgdeildini um at møgulig avgerð eigur at verða treytað av viðurskiftunum um stuðlamúr móti Vegnum Langa.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti at selja matr.1 ng, Hoyvík, orsakað av at høvuðskloakkin frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, ið liggur undir hesum øki. Mælt verður eisini til at beina málið í teknisku nevnd.

Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tekniska nevnd 11. februar 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 17. februar 2010: Samtykt at taka undir við byggi- og b□arskipanarnevndini og teknisku nevnd og ikki ganga umsóknini á møti at selja matr.1 ng, Hoyvík, orsakað av at høvuðskloakkin frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, liggur undir hesum øki.

Spurningurin um ein møguligan brúksrætt til økið verður tikin upp aftur, tá ið ógreiðu viðurskiftini á økinum eru endaliga avgreidd.

Fíggjarnevndin 19. januar 2011: Samtykt at heita á umsitingina at gera tilmæli um treytir fyri einari møguligari sølu at leggja aftur fyri aftur politiska myndugleikan.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at selja Kaj Andreasen og Co. Økið , ið søkt er um at keypa, við treytum, sum umsitingin hevur sett, og harumframt treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

Býráðið 24. februar 2011: Atkvøtt varð um tilmæli frá Boga Andreassen, um at beina málið aftur í byggi- og b□arskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Fr□dal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

35/11 **<u>2010-1161</u>**

<u>Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2010</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunust□rið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri apríl 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 16. juni 2010: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri mai, juni, juli og august 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 9. september 2010: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri september 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 17.november 2010: Framlagt og góðkent.

Býráðið 25. november 2010: Einmælt góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri oktober 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 8.desember 2010: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri november 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 19. januar 2011: Góðkent, tó samtykt at biðja um frágreiðing um tey øki, ið hava hall.

Býráðið 27. januar 2011: Einmælt góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri desember 2010 verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Framlagt og góðkent, tó samtykt at biðja um frágreiðing um tey øki, ið framvegis hava hall.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt góðkent.

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ 24. februar 2011	Blað nr.: **8903**
	Formansins merki:

36/11 **<u>2008-1361</u>**

<u>Umsókn um keyp av AB húsinum</u>

Býráðið 2. september 2010: Einmælt samtykt.

Ískoyti.
Sambært uppskot til skeyti er yvirtøkudagurin settur at vera 1. november 2010, og fellur keypsupphæddin til gjaldingar, tá ið skeytið er tingl□st uttan præjudiserandi rættarviðmerkingar.

Sambært grein 6 í skeytinum, rindar keyparin 6 % í rentu frá yvirtøkudegnum at roknað.

Argja Bóltfelag, ynskir at kunna útseta gjaldið fyri keypið av húsunum í umleið 3 ár, og harumframt at sleppa undan at gjalda fyri rentur.

Niðurstøða:
Tekniskt ber til at áseta at yvirtøkudagurin er undirskrivingardagin, og at peningurin fellur til gjaldingar 1.desember 2013.

Talan verður tá um at kommunan veitir felagnum eitt lán.

Í hesum føri er talan um eitt ítróttarfelag við nógvum limum, og verður virksemið felagsins mett at vera almannagagnligt.

Sum trygd fyri keypsupphæddini, fær kommunan tingl□st skaðaloysisbræv stórt kr. 300.000,00 í ognini, sum kann víkja fyri frammanfyristandandi kr. 900,000,00 til aðrar møguligar kreditorar.

Endamálið er at tryggja kommununi veð í ognini.

Samstundis verður møguligt hjá Argja Bóltfelag at upptaka lán við veð í bygninginum, upp til kr. 900.000,00 soleiðis at samlaða møguliga lántøkan við veð í bygninginum ongantíð verður hægri enn kr. 1.200.000,00

Tilmæli:
Leiðarin í løgdeildin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at útseta gjaldið kr. 230.000,00 fyri keyp av AB-húsunum til 1. desember 2013. Rentan verður sum ásett í skeytinum 6 %.

Sum trygd fær kommunan veð í matriklinum kr. 300.000,00, og kann kommununar veð víkja fyri upp til kr. 900.000,00 til møguligar frammanfyristandandi veðhavarar.

Samstundis verður mælt til at n□ta leigusáttmála, sum er skrásettur í mál 2008-1361/19 , sum verður galdandi óuppsigiligur av báðum pørtum til 1. januar 2037.

Fíggjarnevndin 17.november 2010: Samtykt at gera avtalu við AB um at rinda gjaldið á 230.000 kr. yvir tr□ ár við eins stórari upphædd hálvárliga fyrstu ferð 1. juni 2011. Rentan verður sum ásett í skeytinum 6 %.

Sum trygd fær kommunan veð í matriklinum kr. 300.000,00, og kann kommununar veð víkja fyri upp til kr. 900.000,00 til møguligar frammanfyristandandi veðhavarar.

Samstundis verður samtykt at n□ta leigusáttmála, sum er skrásettur í mál 2008-1361/19 , sum verður galdandi óuppsigiligur av báðum pørtum til 1. januar 2037.

Ískoyti:
"Tingl□singin hevur tikið avgerð um, at tað ikki ber til at tingl□sa skeytið, leigusáttmála o.a. í sambandi við søluna av AB-húsinum. Orsøkin er, at kommunan er eigari av bæði undirlendinum og bygninginum, og at hesi tí eru at meta sum ein samlað føst ogn, ið ikki nú kann slítast sundur aftur við tí endamáli at selja bygningin burturav ognini. Hetta ber m.a. í sær, at AB ikki kann taka lán í bygninginum fyri seg, og at peningastovnar ikki kunnu fáa tingl□st veð í byginginum fyri seg fyri lán, teir hava veitt AB.

Skal AB hava møguleika at ogna sær AB-húsið og taka upp lán í húsinum, er neyðugt, at undirlendið eisini verður selt felagnum. Hetta má alt annað líka hava við sær ein hægri sølupris.

Tilmæli:
Miðfyrisitingarstjórin mælir til, at fíggjarnevndin tekur prinsipiella støðu til at selja AB undirlendið undir AB-húsinum."

Fíggjarnevndin 19. januar 2011: Nevndin er prinsipielt sinnað til at selja AB lendið undir bygninginum. Samtykt at beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina at taka støðu til, um lendið kann verða frámatrikulerað samlaðu ognini.

Ískoyti:
Lendið sum AB-húsini eru bygd á, er frámatrikulerað, og er tískil ikki neyðugt at beina málið í byggi-og b□arskipanarnevndina.

Vísandi til at talan er um undurlendi við ástandandi húsum sum í tingl□singarhøpi verður definera sum ein samlað ogn, verður sum eisini omanfyri greitt frá, neyðugt at selja felagnum undirlendið við ástandandi sethúsum.

Tilmæli:
Leiðarin í løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja matr. nr. 4fp, kirkjubøur – Argir, sum umfatar eitt grundøki til støddar 196 fermetrar við ástandandi felagshúsum fyri kr. 230.000,00

Kommunan treytar sær í søluni ein tingl□stan forkeypsrætt til ognina, og at kommunan altíð kann mótrokna studning/stuðul sum er veittur at Tórshavnar kommunu í ásetta keypsprísinum.

Um kommunan ger forkeypsrættin galdandi, skal ein virðismeting gerast av ognini, av 3. óvildugum fólkum sum eru tilnevnd av Føroya Rætti.

Aðrar samtyktir verða óbroyttar galdandi.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla b□ráðnum til at selja AB matr. Nr. 4fp, Kirkjubøur við ástandandi felagshúsum fyri kr. 230.000,00.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

37/11 **2002-1699**

Umsókn um byggiloyvi frá sp/f Protek vegna Ognarfelagið 1980 (p/f Skipafelagið Føroya) til umbygging og útbygging av matr.nr. 156, 159, 161c, og 185c.

Lýsing av málinum - samandráttur:
Umsókn frá sp/f Ognarfelagið 1980 (Skipafelagið), dagfest 31. mai 2001, er send kommununi til ummælis frá Matrikulstovuni.

Søkt verður um at samanleggja matr. nr. 161 e, 159 og 156 til eina ogn. Ognirnar liggja á Bryggjubakka.

Sp/f Ognarfelagið eigur ognirnar matr. nr. 156, 161 e og 159.

Umsóknin er grundað á umbygging, ið fer fram á verandi bygningi á matr. nr. 156. Fyri at lúka brunakrøvum – vindeygu og neyðtrappa móti matr. nr. 161 e - er neyðugt, sambært kunngerð um brunaverju og brunatrygd, at hesar ognir verða samanlagdar.

Nevndu ognir liggja innan D1-øki í serstaku byggisamtyktini fyri Reyn. D1 skal einans verða n□tt til vinnulívsendamál, og byggingin skal vera kannað skrivstovu-

, umsitingar- og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera.

Byggi- og býarskipanarnevndin 20. august 2001: **Samtykt at viðmæla umsóknini um samanlegging av matr. nr. 156, 161 e og 159.**

Uppískoyti:

Tann 27. november 2001 søkir sp/f Protek um broyting av byggilinjuni fyri 185 c úti í Bakka, Tórshavn, úr 9 m breidd upp í 11,26 m.

Orsøkin til hetta ynski er, at teir hava ætlanir um at byggja nýggjan bygning heiman fyri gamla bygningin hjá Wenzel Petersen (156). Hesin nýggi bygningurin er ætlaður at hava somu breidd sum nú umbygdi bygningurin.

Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir frá at ganga ynskinum á møti, tí nýbygging á økinum skal fylgja ásetingunum í serstøku byggisamtyktini fyri Reyn, øki D1.

Byggi- og býarskipanarnevndin 11. februar 2002: Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Uppískoyti:

Tann 25. mars 2002 hevur sp/f Ognarfelagið 1980 sent skriv har víst verður á brævarskiftið millum partarnar viðv. matr. nr. 185 c og 156 úti í Bakka.

Sp/f Ognarfelagið 1980 vísir á makaskiftisavtaluna og vísir á, at nýtt hús kundi byggjast út til somu linju sum grannahúsini, tá umstøðurnar loyvdu tí.

Teir vísa eisini á, at ferðsluviðurskiftini eru trong og vandamikil, sjálvt um at bygningurin er smalur, men kunnu blíva betur, um innvikið á hesum strekki av bryggjuni verður breiðkað.

Sp/f Ognarfelagið 1980 hevur sent 3 uppskot inn, tað fyrsta vísir, at byggilinjan er fastløgd sambært ætlan, ið krevur bygningarnar báðumegin niðurtiknar, tað næsta vísir, hvussu lítla ávirkan ein breiðari bygningur hevur á verandi umhvørvi, og tað triðja vísir, hvussu nógv ein breiðari bryggja bøtir um plássið.

Sp/f Ognarfelagið 1980 vónar fult ella partvíst, at býráðið kann taka undir við sjónarmiðinum hjá teimum. Sp/f Ognarfelagið 1980 bjóðar sær til at luttaka í kostnaðnum av einari møguligari fyribils breiðkan av bryggjuni ella øðrum tiltøkum, sum kunnu hjálpa til at fremja ætlanina.

Málið má leggjast fyri Reynanevndina og Tórshavnar Havn til góðkenningar, um ætlanin skal gerast.

Umsøkjarin hevur áður søkt um byggiloyvi á økinum, og tá kom klaga um jørðarbeiðið og ætlaðu n□bygging á matr. nr. 185 c og 156 frá borgarum á Reyni.

Byggi- og býarskipanarnevndin 3. juni 2002: Samtykt at taka upp samráðingar við umsøkjaran um treytirnar fyri at fremja ætlanina, herundir hvør skal gjalda bryggjukantin og hvat virksemi skal verða í bygninginum.

Uppískoyti:
15. oktober 2002 var fundur við Ognarfelagið 1980 við luttøku av Árna Joensen fyri Ognarfelagið, Niels Juul Nattestad fyri Statoil og Kára Lamhauge fyri Protek, sum er ráðgevi hjá Ognarfelagnum, og Magna Dalsgaard, Hans Lyngsø og Marius Müller fyri Tórshavnar kommunu, har fylgjandi uppskot var til viðgerðar, sum eisini varð samtykt at fara víðari við til politiska viðgerð.

Bryggjan verður breiðkað til at verða 6 metur, umframt at 1,5 metur breið trægongubrúgv uttaná, har smábátar kunnu liggja sum er vanligt nakað lægri enn bryggjukanturin er í dag, uml. 70 cm oman fyri miðal vatnstøðu.

At ætlaða byggingin verður 22 x 11 metrar, sum víst á hjáløgdu tekningum nr.004, og at niðasta hædd á bygninginum verður partvíst n□tt til parkering, 4-6 parkeringspláss, og restin av niðaru hædd verður skipað soleiðis, at tað skal bera til at leiga tað til virksemi, sum er vent úteftir ímóti bryggjuni.

Aftrat parkeringini, sum verður gjørd á niðastu hædd, verður miðað eftir at fáa eini 4-6 parkeringspláss úti á sjálvari bryggjuni annaðhvørt ímóti bygninginum ella ímóti trægongubrúnni. Fyriliggjandi projekt er gjørt av sp/f Protek, ráðgevandi verkfrøðingar, og umfatar tekning nr. 1, 2, 3, 4, dagfest 16. september 2002, umframt eina kostnaðarmeting, dagfest 26. september 2002.

Tvey uppskot fyriliggja. Uppskot eitt er uttan træbrúgv og er mett at kosta kr. 905.000,00 uttan mvg.

Uppskot tvey er við træbrúgv og er mett at kosta kr. 1.185.000,00 uttan mvg.

Viðvíkjandi breiðkan av bryggjuni, so eru partarnir samdir um, at tað verður trupult at gjøgnumføra byggingina, uttan at bryggjan verður breiðkað, soleiðis at ferðslan kann koyra aftur og fram, og tí hevur Tórshavnar kommuna ynskt at tosa um treytirnar fyri at fremja ætlanina, herundir eisini hvør skal gjalda bryggjukantin.

Ein loysn kundi verið at báðir partar rindaðu arbeiðið við eini helvt hvør, og tá er talan um uppskot 1, sum er mett til kr. 905.000,00 uttan mvg. Partarnir meta, at tað er rættast, at Tórshavnar havn stendur sum byggiharri og letur arbeiðið gera.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í serstaka byggiráðnum fyri Reyn, tann 1. november 2002.

Byggiráðið samtykti at taka undir við uppskoti ”Planur 02”, har parkering verður við ”kaikantin” burtur frá bygninginum. Viðmerkt verður, at eingin parkering skal verða í niðastu hædd í n□ggja bygningum.

Harumframt var samtykt, at í sambandi við bygging av n□ggjum bygningi við størri breidd, enn ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini fyri Reyn vanliga loyva, skal hægsta punkt á bygninginum ikki verða hægri enn hægsta punkt við vanligari breidd.

Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir til at arbeitt verður framyvir við uppskotinum merkt planur 02, og at eingin parkering verður í niðastu hædd í n□ggja bygningum.

Byggi- og býarskipanarnevndin 11. november 2002: Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

Eisini samtykt at niðasta hædd skal n□tast til útatvent virksemi.

Raðfestingin skal verða soleiðis, at einki byggiloyvi verður givið, fyrr enn bryggjan er bygd.

Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir fíggjarnevndini til at játta kr. 780.000,00 til uppskotið merkt planur 2.

Fíggjarnevndin 21. november 2002: Samtykt at taka undir við byggi- og b□ar-skipanarnevndini, har helvtin av kostnaðinum av at breiðka bryggjuna verður borin av p.f. Ognarfelagnum og at játta upp til kr. 800.000 av reguleringskontoini.

Havnarnevndin 25. november 2002: Tikið verður undir við ætlanini. Eisini samtykt at projektera og gera n□ggja kostnaðarmeting, treytað av at p/f Ognarfelagið rindar helmingin av projekteringskostnaðinum.

- Málið bleiv sent serstaka byggiráðnum fyri Reyn.

Í skrivi frá byggiráðnum fyri Reyn, dagfest 13. november 2003, verður biðið um heildarætlan fyri alt havnaøkið heimanfyri og yvir til Skálatrøð.
Í skrivi frá byggiráðnum fyri Reyn tann 17. desember 2003, verður sagt, at tann lægra bryggjan skal hava sama skap og snið, sum bryggjan heima við Skálatrøð, og snøgg grótlaðing skal vera fram við vegnum.
Við atliti til broytingarnar, sum byggiráðið fyri Reyn ynskti, bleiv n□ggj kostnaðarmeting, dagfest 27. januar 2004, gjørd. N□ggja kostnaðarmetingin var upp á 2 mió. kr. Málið datt nú niðurfyri, tí Ognarfelagið 1980 misti áhugan.

Økið úti í Bakka er í vánaligum standi, og umstøðurnar at hava bátar liggjandi har, eru ikki góðar, tí tað er trupult at koma umborð á bátin, og at binda hann í land.

Tilmæli frá havnarmeistaranum:
Mælt verður til at taka málið uppaftur, og at kanna við avvarðandi myndugleikar, um møguligt er at byggja sambært tí seinasta projekt uppskotinum.

Havnarnevndin 7. desember 2009: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

- Endaligt byggiloyvi er fingið frá byggivaldinum, og tað er klárt at bjóða út.

B□ráðið samtykti á fundi tann 14. desember 2006, at tað er Tórshavnar kommuna, sum stendur fyri og eigur allar íløgur í smábátahavnir og fíggjar hesar av íløgukarminum hjá kommununi.

Ætlanin var at gera íløguna í 2002/2003, men ætlanin kom í drag, tí at tað var trupult at fáa eina avgerð frá avvarðandi myndugleikum. Hetta førdi so í seinasta enda til, at Ognarfelagið 1980 misti áhugan.

Tilmæli frá havnameistaranum:
Av tí at ætlanin var at gera íløguna í 2002/2003, og langt áðrenn samtyktina tann 14. desember 2006, at tað er Tórshavnar kommuna sum fíggjar íløgur í smábátahavnir, verður mælt til, at Tórshavnar havn, í hesum førinum, fíggjar íløguna av íløgukarminum fyri 2011. Mælt verður eisini til, at arbeiðið verður boðið út.

Havnarnevndin 17. desember 2011: Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 60.000,- til endaliga projektering og útboð og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

38/11 **<u>2009-1391/24 SG</u>**

<u>Útbygging av Hoyvíkshøllini</u>

Lýsing og samandráttur av málinum:
Hoyvíkshøllin varð tikin í n□tslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein l□sing av tørvinum og kostnaðarmeting.

Tilmæli:

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at l□sa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

Mentamálanevndin 27. mai 2009: Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla b□ráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at l□sa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

Fíggjarnevndin 28. mai 2009: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

Býráðið 28. mai 2009: Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

Uppískoyti:
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 m^2 verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520m^2, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

Tilmæli:
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

Mentamálanevndin 11. november 2009: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 18. november 2009: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009: Málið varð umrøtt.

Býráðið 26. november 2009: Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

Mentamálanevndin 24. mars 2010: Kunnað varð um málið.

Ískoyti:
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

Fíggjarnevndin 14. apríl 2010: Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

Mentamálanevndin 28. apríl 2010: Kunnað varð um málið.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

Mentamálanevndin 17. mai 2010: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 20. mai 2010: Samtykt at mæla b□ráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

Býráðið 20. mai 2010: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Mentamálanevndin 1. september 2010: Kunnað varð um málið.

Mentamálanevndin 3. november 2010: Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

Mentamálanevndin 12. januar 2011: Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Ískoyti:
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

B□ráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla b□ráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

39/11 **2011-0310/1 SG**

Felags rakstrarstað til Høllina á Hálsi, Hoyvíkshøllina, Badminton-høllina og Fimi

Tær f□ra hallirnar Høllin á Hálsi, Hoyvíkshøllin, Badmintonhøllin og Fimleikahøllin Fimi hava í løtuni hvør sítt rakstrarstað. Tey eru:

5711 Høllin á Hálsi
5712 Hoyvíkshøllin
5714 Badmintonhøllin
5715 Fimi

Omanfyri nevndu hallir hava felags hallarleiðara, sum hevur raksturin um hendi. Mett verður, at tað er meira hóskandi, at raksturin verður lagdur saman til eitt felags rakstrarstað.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at eitt felags rakstrarstað verður stovnað til allar f□ra hallirnar.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ískoyti:
Hallarumsitingin fevnir í dag ikki um Ítróttahøllina í Kollafirði, og tí er rakstrarstðið 5713 Ítróttahøllin í Kollafirði ikki fevnt av uppskotinum um felags rakstrarstað omanfyri. Umsitingin hevur síðani samskift við hallarleiðaran og

hallarvørðin í Kollafirði um møguleikan fyri felags rakstrarstaðið fyri allar kommunalu ítróttahallirnar, og at hallarvørðurin í Kollafirði í framtíðini vísir til hallarleiðaran. Í dag vísir hallarvørðurin til mentamálaleiðaran. Partur av hesum er eisini samskipan av útleiganini.

Talan er sostatt eisini um eina bygnaðarbroyting í mun til starvsviðurskiftini hjá hallarvørðinum.

Niðurstøðan av hesum samskifti er, at hallarvørðurin í Kollafirði kann gerast partur av Hallarumsitingini við tilvísing til hallarleiðaran, og at rakstrarjáttanin hjá ítróttahøllini í Kollafirði somuleiðis verður løgd til nýggja rakstrarstaðið Hallarumsiting, konta 5716.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at nýggja rakstrarstaðið hevur heitið Hallarumsiting, konta 5716. Harumframt verður mælt til, at raksturin av Ítróttahøllini í Kollafirði verður lagdur til felags rakstrarstaðið Hallarumsiting, og at hallarvørðurin vísir til hallarleiðaran.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini 9. februar 2011 og stovnað eitt felags rakstrarstað til allar hallirnar. Harumframt samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við, at rakstrarjáttanin hjá ítróttarhøllini í Kollafirði verður løgd til nýggja rakstrarstaðið Hallarumsiting, konta 5716.

Býráðið 24. februar 2011: Atkvøtt varð um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Símun Simonsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Levi Mørk.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus.

40/11 **2011-0312**

Útleiga av teimum kommunalu fimleikahøllunum

21. september í 1990 samtykti Býráðið fyri útleigu av fimleikahøllum hesar prísir og reglur:

1. a) Útleigan av fimleikahøllum kr. 100,00 um tíman fyri einstaklingar og onnur, ið ikki eru limir í ÍSF.
   b) Fyri ítróttarfeløg í Havn kr. 60,00 um tíman.
   c) Fyri felagsskapir (dansifeløg og tílíkt) kr. 200,00 um tíman.
2. Herumframt verður galdandi fyri alla útleigan, at um eykaútreiðslur verða av at útleiga hølini, skal gjaldast fyri tað.
3. tað er ein treyt fyri at leiga fimleikahøllina, at tey feløg og einstaklingar, ið n□ta fimleikahallirnar, skulu boða ***skrivliga*** frá til skúlastjóran, hvør ið hevur ***ábyrgdina teir einstøku tímarnar*** av fimleikahøllini, tá ið tey n□ta høllina.
4. Peningurin skal gjaldast á roknskapardeildini (kassin), ***áðrenn byrjað verður***. Gjaldast skal tveir mánaðir frammanundan. Viðkomandi fær so eina kvittan, og ein verður send skúlanum, og roknskapardeildin hevur so eina eftir. ***Um peningurin ikki er goldin, hevur ein ikki atgongd til fimleikahallirnar***.

Uppskot er at dagføra prísir og reglur fyri at leiga hallirnar út.

Uppskot

1. a) Útleigan av fimleikahøllum kr. 150,00 um tíman fyri einstaklingar og onnur, ið ikki eru limir í ÍSF.
   b) Fyri ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu kr. 60,00 um tíman.

   c) Fyri felagsskapir (t.d. dansifeløg) kr. 350,00 um tíman.

2. Tað er galdandi fyri alla útleigu, at um eykaútreiðslur standast av at útleiga hølini, skal gjaldast fyri tað.

3. Tey feløg ella einstaklingar, sum leiga fimleikahallirnar, skulu skrivliga boða samskiparanum frá, sum hevur samskiftið við skúlastjórarnar, hvør hevur ábyrgdina av fimleikahøllini teir einstøku tímarnar, tá tey n□ta høllina.

   Fráboðanin skal latast skúlanum, áðrenn útleigan byrjar.

4. Rokning verður send leigarunum, og gjaldast skal frammanundan fyri í minsta lagi tveir mánaðir í senn.

5. Kommunalu fimleikahallirnar verða ikki útleigaðar til vinnuligt endamál.

Tilmæli

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin taka undir við, at prísir og reglur fyri útleigu av kommunalu fimleikahøllunum verða dagførd og mæla til, at uppskotið verður samtykt og beint víðari í fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við broytingunum í reglugerðini, men ikki príshækkingum.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og góðkenna uppskotið um prísir og reglugerð fyri útleigu av kommunalu fimleikahøllunum.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina.

41/11 **2005-1183/38 SG**

Viðv. matr. nr. 297 - Reinsaríið.

Lýsing av málinum – samandráttur:
B□arskipanardeildin hevur gjørt innleiðandi kanningar av bygninginum á matr. nr. 297.

Endamálið við kanningararbeiðinum hevur verið at gera eina støðismeting av bygninginum, ið skal liggja til grund fyri seinni støðutakan til bæði endamálsorðing og arbeiðsgongd fyri eitt hvørt arbeiði við ognina.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina havt í umbúna at væla um omanfyri nevndu ogn. Ognin er áhugaverd. Her er eitt gamalt pakkhús í søguligu Havnini, og hevur B□arsavnið gjørt viðmerkingar til ætlanina at varðveita bygningin.

Húsasøga
Við avtøku kongliga handilsins varð m.a. sonevnda “Nýggja Pakkhús” í Vágsbotni (Frederiksvaag) selt á uppboði í 1857.[1] Keyparin var handilshúsið C. F. Siemsen í Hamburg. Skeytið varð lisið sama ár.

Í 1894 seldi keypmaðurin Johannes Hansen, týskur varakonsul, pakkhúsið fyri Siemsen til føroyska handilshúsið M. C. Restorff & Sønner. Konsul Hansen, sum hann kallaðist, var í starvi hjá Siemsen, og seinni keypti hann sjálvur fyritøkuna. Hann myndaði Siemsen í Havn, og harav stavar navnið Hansens pakkhús.

M.C. Restorff & Sønner keypti sum sagt ognina í Vágsbotni. Í skeytinum stendur skrivað ymiskt:

“...en Pakhusbygning, 2 Etager Høj, ca. 30 Alen lang og 16 Alen bred med den tilsammen hørende Tømmerplads, der med den Grund, hvorpaa Pakhuset staar, udgjør en Firkant [...] og hvoraf en østre Del er særskilt indhegnet og Dyrket som Have...” [2] Konsul Hansen tryggjaði sær rættin til urtagarðin eystan fyri Tórsgøtu, nevnt “Hansens Have” - t.e. í dag parkeringsplássið niðan móti Kommunu-skúlagarðin og ‘Fish & Chips’.

Í 1923 seldi M.C. Restorff & Sønner ognina til Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik, Meiaríið. Keypssáttmálin nevnir ognina “Hansens pakkhús”.[3] Tey høvdu eitt nú framleiðslu av sápu í pakkhúsinum.[4] Meiaríið helt fram í bygninginum og hevur havt vaskarí og reinsarí fram til 1970-árini. Maria Olsen hevði Reinsaríið í erva til fyri fáum árum síðani, meðan Postverk Føroya hevði eina pakkadeild í neðra.

Tórshavnar kommuna hevur átt bygningin síðani 1986.

Kanningar av ognini
Føroya Fornminnissavn hevur áður víst ognini áhuga. Í 1981 gjørdi táverandi savnsarkitekturin Rúni H. Øster eina skitsuuppmáting. Annað er ikki at finna í málinum.

Søgufrøðingurin Ásla Weihe hevur í ritgerð um handilin hjá Ryberg í seinnu helvt 18. aldar við rúgvismiklum skjølum roynt at endurskapa upprunaliga umhvørvið í Vágsbotni. Víst verður til verk Carl Mogensens: Færøske Krønike (1844, seinni útgivið í Tórshavn 1970), at uml. 1820 skal kongligi handilin hava keypt gomlu ognirnar hjá Ryberg *“...hvis Pakhus af 130 alens Længde, var solid bygget af svær pommersk Tømmer, og hvor Handelen, saalænge det stod, stedse havde 1500 à 2000 Tdr. Korn paa Oplag...”.* Víðari vísir Ásla Weihe á eina húsaskrá í 1784, at pakkhúsið var 100 x 15 alin, meðan ein húsaskrá í 1819 sigur, at tá stóð pakkhúsið ikki uppi.

---

[1] Yvirlit yvir sølu av ognum einahandilsins, sí Mikkjal Helmsdal: ...verjir fyri Havnarvág (Tórshavn 1994), s. 56-60.
[2] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1894-1895, nr. 29, s. 90.
[3] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1922-1923, nr. 47, s. 755-756.
[4] Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik 1908-1958 (Tórshavn 1958), s. 20.

Við støði í 1784-skrásetingini lýsir Ásla Weihe í einum uppskoti, at Vaskaríið, sum vit kenna tað í dag, kann hava verið partur av einum longum pakkhúsi - 100 x 16 alin. T.v.s. at handilin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni (Sosialurin) og norður um verandi Vaskarí hevur verið ein bygningur. Hetta verður undirbygt við skjali hjá amtinum, sum sigur: *"...det for störste Delen kommer til at hvile på Fundamentet af det der forhenstående Pakhus..."* [5]

Kanningin hjá Áslu Weihe av umhvørvinum er virðismikil. Við skjølum hevur hon greinað søguliga Vágsbotnshandilin aftur til 1766.

Tað er sjáldsamt við eini húsaogn uppi í tí nýggjara býnum, har søguligu sporini ganga meira enn tvær øldir aftur til tað gamla samfelagið. Hóast pakkhúsið sambært greining Áslu Weihe av Rybergstíðini varð endurreist í 1831, so er slóðin av virknu tíðini hjá Ryberg, frá tí fyrsta átakinum at hava skipaða framleiðslu av fremmandum vørum í Føroyum, kortini sjónlig.

Pakkhúsið er harnæst ein vitnisburður um virksemið hjá kongliga handlinum og hjá eitt av fyrstu útlendsku handilshúsunum í fríhandilstíðini, Siemsen, og síðani hjá eitt av fyrstu stóru føroysku handilshúsunum, Restorff - tá ið Føroyar gjørdust fiskivinnutjóð. Bygningurin hevur v.ø.o. staðið uppi og verið í brúki í fleiri søgulig skeið.

Eru vit lagalig, so siga vit, at aldurin á pakkhúsinum skjótt er 175 ár. Forsøgulig viðurskifti kunnu vit ikki rættiliga fáa skjalfest, men lítið er at ivast í, at pakkhúsið hevur verið partur av handilsumhvørvinum við Vestaruvág seinast í 1700-talinum.

Á Fornminnissavninum eru fotomyndir av pakkhúsinum við flagtekju og tjøraðum klædningi og myndir av bygninginum á leið soleiðis, sum hann sær út í dag. Hesar eru úr savninum hjá myndatakaranum Absalon Joensen og kunnu helst tíðarfestast til 1920-30-árini og fyri vist frá krígnum 1940-1945.

Býarskipanardeildin hevur gjørt fullfíggjaðar uppmátingar av bygninginum og hevur gjørt frágreiðing um støðismeting, kostnaðarætlan og arbeiðsgongd framm yvir.

Arbeiðið verður mett at skula gerast í stigum.

Skotið verður upp at fara undir at taka verandi klæðing frá fyri at sleppa at umvæla og skifta berandi konstruktiónir, haraftrat skal farast undir at klæða og skifta vindeygu og hurðar, sum hoyrandi til 1. byggistig.

Tilmæli:

[5] Ásla Weihe: Rybergshandilin og Rybergstíðin í Føroyum (Varðin 58, Tórshavn 1991), s. 26-27.

B□ararkitekturin mælir til at nevndin góðkennir ætlanina, og at nevndin mælir b□ráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at játta kr. 900.000, til hetta arbeiðið, av íløgunum fyri 2005.

Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 18. mai 2005: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við byggi- og b□arskipanarnevndini.

Býráðið 26. mai 2005: Einmælt samtykt.

Lýsing:
Tilboð eru komin inn, dagfest 10. nov. 2006, til klæðing (mál nr.2006-3262/2), skifta vindeygu og hurðar, grevstrararbeiði rundan um Pakkhúsið og ymisk neyðug HVS-arbeiði.

Lægsta tilboð hevði Húsavarðartænastan áljóðandi		
	kr. 2.096.370,00	+ MVG
Projektering og eftirlit verður mett til	kr. 300.000,00	+ MVG
Óvæntað verður mett til 15%	kr. 360.000,00	+ MVG
Tilsamans mettur kostnaður uttan MVG	kr. 2.760.000,00	
Tilsamans mettur kostnaður við 6,25%MVG	kr .2.932.500,00	

Tilmæli:
B□ararkitekturin og tekniski stjórin mæla til, at peningurin kr. 2.932.500,00 til hetta arbeiðið verður fíggjaður við 2 mill. kr. av konto 82, sum so skal tillagast, og við 500.000 kr av íløgum fyri fríðkan av b□num, vísandi til at partur av arbeiðinum er í lendinum kring bygningin. Endaliga varð avsettur peningur í 2006, og eru uml. 500.000 kr eftir av hesum at brúka.

Sostatt verður mælt til at mæla b□ráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum, og fíggja tað eftir ávísta leistinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 16. februar 2007: Samtykt at taka undir við byggi- og b□arskipanarnevndini og mæla b□ráðnum til at játta kr. 500.000,00 av íløgum.

Býráðið 22. februar 2007: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Uppískoyti:
Í álitinum Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi – verður skotið upp at gera Tórsgøtu til mentanargøtu í Havn, her eru savnað ymisk mentanartiltøk á einum rímiliga lítlum øki, miðskeiðis í b□num. Í dag er fittur partur av hugskotum at gera Tórsgøtu til mentanargøtu vorðin veruleiki. Niðasti partur av Tórsgøtu er vorðin ein rættur mentanardepil, har vit hava:

Tjóðpall Føroya, Margarinfabrikkina, venjingarhølið hjá Tórshavnar Hornorkestri, Posthúskjallaran. Eisini er samtykt at seta Hansens Pakkhús – betri kent sum Gamla vaskaríið – í stand at n□ta til mentanarlig tiltøk.

Fleiri ymisk tiltøk eru staðsett í Tórsgøtu. Eitt tað størsta man vera Asfalt, sum eftir væleydnaða tiltakið í fjør ætlandi veðrur árliga afturvendandi.

Í vár verður fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair hildin í Havn, og partur av teimum tiltøkum, sum tá verða hildin, verða hildin júst í hesum umhvørvinum.

Nú b□ráðið hevur samtykt at umvæla ognina verður neyðugt at taka støðu til hvat húsini skulu brúkast til í framtíðini.

Mentamálanevndin 17. apríl 2007: Nevndin samtykti at heita á umsitingina at kanna møguleikarnar at brúka húsini til spælistað hjá tónleikarum og ungdómslistaskúla, og at leggja málið fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

Mentamálanevndin 15. mai 2007: Nevndin var á staðnum og hugdi eftir húsunum og grannalagnum.

Samtykt at heita á umsitingina um at gera uppskot til heildarætlan fyri reinsaríið, túnið og bygningarnir rundanum.

Uppískoyti:
Kunnað verður um málið.

Mentamálanevndin 2. oktober 2007: Útsett.

Ískoyti:
Avgjørt at geva fyribils loyvi fram til ólavsøku 2008 at royna niðastu hædd á Hansen´s Pakkhús til tónleikaframførslu. Hetta er góðkent av Brunaumsjón Landsins, sløkkiliðsovastanum hjá Tórshavnar kommunu og tekniska stjóranum. Nakað av trygdarútgerð skal uppsetast og ljós og el-veiting má leggjast inn til bygningin. Hetta er mett at kostað uml. kr. 100.000.

Fyri at koma víðari við fyrireikingunum at gera Hansen´s Pakkhús klárt til varandi n□tslu til almenn endamál, er neyðugt at gera eitt prosjekt um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. í bygningin. Mett er at neyðugt er við uml. kr. 300.000 til at gera skitsuppskot.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti mæla kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2008 til mentunnarlig endamál, sum eru settar av til Sankta Frans skúla, lutað sundur til á henda hátt:

- at seta upp trygdarútgerð og gera fyribils el-innleggingar v.m. í royndartíðini fram til ólavssøku 2008 – kr. 100.000
- at gera skitsuuppskot til innrætting og n□tslu – kr. 300.000

og at seta samsvarandi upphædd av til Sankta Frans skúla í 2009.

Mentamálanevndin 17. juni 2008: Samtykt at mæla b□ráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum, tó so at skitsuuppskotið til innrætting og n□tslu eisini umfatar túnið og bygningarnar rundanum í samráð við trivnaðarumsitingina.

Fíggjarnevndin 18. juni 2008: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Býráðið 19. juni 2008: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ìskoyti
Sambært samtykt mentamálanevndsins 17. juni, fíggjarnevndsins 18. juni og b□ráðsins 19. juni 2008 hevur niðasta hæddin í Gamla reinsaríi verið roynd til tónleikaframfrøslu fram til ólavsøku 2008.

Margarinfabrikkin hevur samskipað tiltøkini, sum hava verið. Afturljóð frá tónleikarum og áhoyrarum hava sum heild verið sera jalig, og eftirspurningur eftir at sleppa at halda áfram við hesum royndum, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum, er stórur. Margarinfabrikkin er jaliga sinnað at halda áfram sum samskipari av tiltakinum, men hevur ikki fíggjarliga umstøður at rinda tað, sum hetta kostar í sams□ningum til starvsfólk og vasking, leigu av tónleikaanleggi, vaktarhald v.m., kostnaðarmett til kr. 150.000 árið út.

Tilmæli
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at játta Margarinfabrikkini 150.000 kr. at umsita royndartiltakið, soleiðis at royndirnar kunnu halda áfram, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum.

Fíggjarnevndin 2. september 2008: Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 150.000 av reguleringskontoini.

Málið verður sent mentamálanevndini til kunningar.

Mentamálanevndin 17. september 2008: Kunnað varð um málið.

Mentamálanevndin 11. november 2009: Tikið av skrá.

Uppískoyti:
Mayfinn Norðoy, arkitektur, leggur uppskotið fram og greiðir frá tí.

Mentamálanevndin 2. desember 2009: Nevndin samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan at gera kjallahæddina, og onnur neyðug arbeiði í tí viðfanginum.

Ískoyti:
Eina tíð hevur tilfar við uppskoti um, hvussu Reinsaríið kann endurnýggjast ligið hjá umsitingini. Mentamálanevndin varð kunnað um innihaldið í uppskotinum, sum Mayfinn Norðoy, arkitektur, hevur gjørt á seinasta fundi.

Viðmerkjast skal, at avmarkaðir møguleikar eru fyri kjallarahæddini, tí fyribilsloyvi er útgingið.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at mentamálanevndin sum skjótast at gera uttanumøkið og kjallarahæddina í Reinsarínum í høvuðsheitum sambært hesum uppskoti.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at játta neyðugan pening til uttanumøkið/tún v.m. av íløgukonto Fríðkan av býnum í ár, har kr. 700.000 eru avsettar til endamálið.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at útvega upp til 2,5 mió. kr. av konto 6110 Umsitan av bygningum, til at gera kjallarahæddina í Reinsarínum í ár.

Mentamálanevndin 10. februar 2010: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti:
Vísandi til, at gjørt er skitsuuppskot til innrætting og nýtslu av Reinsarínum, sambært býráðssamtykt frá 19. juni 2008, sum var lagt fyri á fundi í Mentamálanevndini 2. des. 2009, eigur politisk viðgerð av uppskotinum at fara fram í avvarðandi faknevndum og býráðið, og støða takast til uppskotið, áðrenn onnur stig verða tikin. Politisk eigur eisini at verða tikin støða til møguligar broytingar, og hvussu arbeiðið skal fíggjast, um hetta skal setast í verk. Samlaði kostnaðurin av skitsuuppskotinum er mettur til kr. 5.372.400 u. mvg og prosjektumsiting. Hesi viðurskifti eiga at verða avgreidd, áðrenn samtyktin í mentamálanevndini hin 10. febr. 2010 verður framd í verki.

Upplýsast kan, at tekniska umsitingin metir ikki, at heimild er fyri at rinda útreiðslur til hetta arbeiði av konto 6110, vísandi til at talan er um játtan til

viðlíkahald av bygningum, og ikki til íløgur í innrætting til broytta nýtslu av bygninginum. Avsettar eru kr. 20.000 til vanligt viðlíkahald av bygninginum, trygging, streymnýtslu í fíggjarætlanini fyri 2010. Eisini kann leggjast afturat, at konto 6110 harumframt hevur hall frá 2009, sum verður framflutt til 2010, og sum skal sparast inn aftur. Sostatt er heldur ikki fíggjarligt rásarúm á konto 6110 til slíkt arbeiði.

Hinvegin eru kr. 700.000 avsettar á einum uppskotið fyri løgujáttan á konto 6275, sum umsitingin legði fyri teknisku nevnd í samband við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2010. Uppskotið er tó ikki endaliga staðfest í avvarðandi faknevndum og í býráðnum.

Tilmæli:
Á hesum grundarlagið mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til,

1. at beina málið um uttanumsøkið/tún í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið við viðmæli um, at játtað upp til kr. 700.000 av konto 6275 til arbeiði
2. at arbeiði við uttanumsøkinum í høvuðsheitum verður framt sambært tekning hjá umsitingini
3. at mæla Mentamálanevndini til at leggja uppskotið hjá Mayfinn Norðoy, arkitekti fyri avvarðandi faknevndir og býráðið til politiska viðgerð
4. at beina málið um at gera kjallarahæddina aftur í Mentamálanevndina at útgreinað hvat nýtslan skal verða, og hvat skal gerast í kjallarahæddini, og at ávísa fígging, at leggja fyri fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan, vísandi til, at konto 6110 er ætla til viðlíkahald og ikki til íløgur, og at fíggjarligt rásarúm heldur ikki er á hesi konto.

Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010: Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Levi Mørk samtyktu at beina pkt. 1 og 2 í tilmælinum til teknisku nevnd og býráðið um fíggjarnevndina. Meirilutin samtykti eisini, at umsitingin til næsta fund ger eina ætlan fyri hvussu kjallarahæddin av Reinsarínum kann umvælast til spælistað v.m.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur støðu á seinri fundi.

Tekniska nevnd 4. mars 2010: Ein meirluti Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen, samtykti at mæla til, at beina pkt. 1 og 2 í omanfyristandandi tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina frá 1. mars 2010, í býráðið um fíggjarnevndina, og at vísa til samtyktina í máli nr. 2010-0544.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

Fíggjarnevndin 10. mars 2010: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Býráðið 18. mars 2010: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Mayfinn Norðoy, arkitektur kemur at greiða frá um skitsuuppskotið. Tekniska umsitingin greiðir frá um fíggjarligu støðuna á konto 1082.90-82002.

Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010: Málið varð umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010: Vegna vantandi tilfar varð málið útsett.

Ískoyti:
Arkitekturin hevur gjørt tillagingar til innrættingina av Reinsarínum, sambært samtykt í byggi- og b□arskipanarnevndini 1. mars 2010. Eisini er gjørd fylgjandi kostnaðarmeting við stigvísari umbygging av bygninginum, sambært uppskotinum hjá arkitektinum.

2010: kr. 1.245.000
2011: kr. 2.235.000
<u>2012: kr. 2.190.000</u>
Tils.: **kr. 5.670.000** u. mvg, ókent, prosjektumsiting v.m.

Eins og í ískoytinum til fundin í byggi- og b□arskipanarnevndini 1. mars 2010 verður víst á, at tekniska umsitingin metir ikki, at heimild er fyri at rinda útreiðslur til hetta arbeiðið av konto 6110, vísandi til at talan er um játtan til viðlíkahald av bygningum, og ikki til íløgur í innrætting til broytta n□tslu av bygninginum. Avsettar eru kr. 20.000 til vanligt viðlíkahald av bygninginum, trygging, streymn□tslu í fíggjarætlanini fyri 2010. Eisini kann leggjast afturat, at konto 6110 harumframt hevur hall frá 2009, sum verður framflutt til 2010, og sum skal sparast inn aftur. Sostatt er heldur ikki fíggjarligt rásarúm á konto 6110 til slíkt arbeiði.

Tilmæli:
Vísandi til b□ráðssamtykt frá 19. juni 2008, mæla tekniski stjórin og b□ararkitekturin á hesum grundarlagi til,

1. at mæla mentamálanevndini til at leggja dagførda uppskotið hjá Mayfinn Norðoy, arkitekti fyri avvarðandi faknevndir og b□ráðið til góðkenningar
2. at mæla mentamálanevndini, um fíggjarnevndina og b□ráðið at taka støðu til raðfesting av hesi íløgu, og at vísa á eina tíðarætlan og fígging til íløguna.

Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Mentamálanevndin 21. juni 2010: Tikið av skrá.

Fíggjarnevndin 24. juni 2010: Tikið av skrá.

Býráðið 24. juni 2010: Tikið av skrá.

Ískoyti:
Víst verður til samtyktina hjá byggi- og b□arskipanarnevndini, ið tekur støði í dagførdum uppskoti frá Mayfinni Norðoy, arkitekti, um stigvísa umbygging av bygninginum. Sambært hesum skal mentamálanevndin um fíggjarnevndina og b□ráðið í fyrsta lagi góðkenna nevnda uppskot, og í øðrum lagi taka støðu til raðfesting av íløguni, herundir vísa á eina tíðarætlan og fígging til íløguna.

Sambært arkitektinum er íløgan kr. 5.670.000 uttan mvg, ókent og prosjektumsitingin v.m. Við øllum íroknað verður samlaða íløgan uml. kr. 6.700.000. Uppskotið hjá arkitektinum er at fremja ætlanina eftir trimum árum soleiðis – ár 1 kr. 1.245.000 (uml. 22%), ár 2 kr. 2.235.000 (uml. 40%) og ár 3 kr. 2.190.000 (uml. 38%).

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna dagførda uppskotið og beina málið í fíggjarnevndina at raðfesta íløguna á langtíðarløguætlanini.

Mentamálanevndin 1. september 2010: Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá.

Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 9. september 2010: Ein minniluti, Heðin Mortensen og Jógvan Arge, tekur undir við mentamálanevndini og mælir b□ráðnum til, at íløgan verður raðfest á langtíðarløguætlanini, soleiðis at ætlanin verður framd eftir trimum árum soleiðis – í 2011 verða brúktar kr. 1.245.000 (uml. 22%), í 2012 kr. 2.235.000 (uml. 40%) og í 2013 kr. 2.190.000 (uml. 38%) – allar upphæddir uttan mvg, ókent og prosjektumsiting v.m.

Ein minniluti, Marin Katrina Fr□dal og Jan Christiansen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Býráðið 16. september 2010: Einmælt samtykt at taka undir við broytingaruppskoti frá Jan Christiansen um, at útseta málið og taka tað upp aftur í sambandi við íløguætlanina og fíggjarætlanina fyri 2011.

Ískoyti:
Mentamálanevndin og fíggjarnevndin hava ávikavist 1. september 2010 og 9. september 2010 góðkent dagførda uppskotið og ætlanina um stigvísa umbygging av gamla Reinsarínum.

Á íløguætlanini fyri 2011 eru avsettar kr. 1.500.000 til fyrsta stigið, sum fevnir um prosjektering, uppfylging, byggileiðslu, eftirlit og byggiarbeiði á 1. hædd av bygninginum, sum av arkitektinum er mett til kr. 1.245.000 u. mvg.

Kostnaðarmeting har mvg, prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er íroknað, er av umsitingini mett til kr. 1.650.000.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játtað umsitingini heimild

- at fara undir samráðingar við ráðgevan um sáttmála um prosjektering, eftirlit og byggileiðslu v.m. fyri upp til kr. 450.000 at leggja fyri nevndina aftur
- at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku

og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina, at góðkenna uppskotið hjá ráðgevanum, og omanfyristandandi.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen mæla til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á einum seinni fundi.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla b□ráðnum til at játta kr. 450.000,00 av íløgum fyri 2011, konto 5375, Reinsaríið.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

42/11 **<u>2009-3106</u>**

<u>Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og b□ráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í b□num. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

Tilmæli:
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 2. desember 2009: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 9. desember 2009: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Býráðið 17. desember 2009: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av n□ggjum Musikkskúla og l□sing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortud□ki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan n□bygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum l□sir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri n□ggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

Mentamálanevndin 2. juni 2010: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið.

Býráðið 24. juni 2010: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

Ískoyti:
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

43/11 **<u>2006-1053 BH</u>**

<u>Alment wc í Kirkjubø</u>

Lýsing av málinum - samandráttur.
Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006: Kunnað var um málið.

Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007: Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at seta pening av til almenn wc í Kirkjubø og rakstur.

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007: Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Higartil er ikki peningur settur av til verkætlanina. Søkt er um játtan í 2008 til slíkar íløgur.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til umbønina frá staðbundnu nevndini.

Tekniska nevnd 17. januar 2008: Nevndin samtykti at taka undir við áheitanini frá staðbundnu nevndini og at gera uppskot til staðseting og søkja avvarðandi myndugleikar um loyvi.

Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008: Kunnað varð um málið. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir til vega, men játtan er ikki sett av til hetta arbeiðið í íløgum. Møguliga kann hetta fíggjast um raksturin.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. mai 2008: Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at arbeiða við eini loysn.

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir biðja um status í málinum.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 22. oktober 2008: Tóri í Hoyvík kunnaði um málið. Málið er hjá Fornminnismyndugleikanum.

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir ynskja at verða kunnaðir um heildarætlanina frá fornminnismyndugleikanum.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 9. desember 2008: Svar er ikki komið frá Fornminnismyndugleikunum enn.

Ískoyti:
Umsitingin hevur í skrivi frá Føroya Fornminnissavni, dagf. 17.12.2008, fingið uppl□st, at sambært áliti um heildarætlan fyri varðveitingini av fornminnum í Kirkubø, verður mælt ikki til at gera viðskiftahús, áðrenn politisk støða er tikin til tilmælið. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

Tekniska nevnd 14. mai 2009: Leiðarin á lendisdeildini kunnaði um status í málinum. Nevndin samtykti at beina málið í byggi-og b□arskipanarnevndina til endaliga staðseting av viðskiftahúsinum(almennum wc og buss-sk□li).

Ískoyti:
3 uppskot eru í umboði, viðv. staðseting av viðskiftahúsi (alment wc og busssk□li). Umsitingin mælir til 3 møguleikar á trimum økjum, liggjandi í økinum H. Økið er lagt av til frílendi, úthús líknandi bygning til tænastur, men ikki íbúðarbygning.

Økini liggja á matrikkul nummar 8a (A). Vit mæla ti, at hetta økið er best egnað. Næstbest egnað er 10a (B). Triðja best egnaða økið er 20 C (C). Sí ávikavist niðanfyri, og hjáløgdu tekning:

A.8a	Ognarviðurskifti: Búnaðargrunnurin fyrr (Føroya Jarðargrunnur) samb. Dóm 30.09.1999. Sí tekning: Uppskot til viðskiftahús í Kirkjubø, 09.01.1999, J.P. Gregoriussen & U. Patursson
B. 10a	Útbygging av kaffistovu. Gjøllari kanningar eru neyðugar
C. 20 c	Ognarviðurskifti Tórshavnar kommuna.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at velja uppskot A.

Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

- Kunnað verður um status.

Tekniska nevnd 3. september 2009: Kunnað varð um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið.

Tekniska nevnd 14. januar 2010: Nevndin samtykti at heita á borgarstjóran um at taka málið upp við viðkomandi landsst□risfólk, við støði í skrivi frá Føroya Fornminnissavni (j. nr: 2006-1053/13), vísandi til t□dningin av at hava nøktandi umstøður í sambandi við ferðavinnuna og vitjandi annars. Nevndin ynskir at n□tt alment wc er uppsett áðrenn summar 2010.

Sjúrður Olsen farin av fundi.

Vísandi til skriv frá Sølvá Paturson, j nr 2006-1053/18, staðfestir nevndin, at wc verður tikið burtur áðrenn summar 2010.

- Kunnað verður um málið.

Tekniska nevnd 11. februar 2010: Málið útsett.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 18. januar 2010: Kunnað varð um málið.

Ískoyti:
Umsitingin kunnar um støðuna, eftir at borgarstjórin hevur havt fund við landsst□riskvinnuna mikudagin 3. mars 2010. Umsitingin skal eisini vísa á, at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini til viðskiftahús í Kirkjubø, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

Tekniska nevnd 4. mars 2010: Málið útsett, tí at fundurin millum borgarstjóran og landsst□riskvinnuna varð útsettur.

Ískoyti:
Fundurin við landsst□riskvinnuna hin 3. mars 2010 var avl□stur av landsst□riskvinnuni.

Umsitingin hevur eisini havt samskifti við Føroya Fornminnissavn um málið. Í skrivi móttikið 30. mars 2010 svarar Fornminnissavnið, soleiðis:

> Við tað, at tær tænastur, viðskiftahúsið er ætlað til, eru alneyðugar, metir Fornminnissavnið tað verða skilabest at fremja uppskotið, ið fyriliggur. Hetta tó við tí fyrivarni, at talan er um eina fyribils loysn, av tí at nevndu tænastur fara at verða tiknar við í oman fyri nevndu yvirordnaðu økisskipanina. Vert er at gera vart við, at henda økisskipan fer at verða Tá hon fyriliggur, kann henda, at funnin verður onnur loysn á hesum tænastum, ið sampakkar við eina heild. Tá farið verður undir at fremja ætlanina til viðskiftahús eigur kommunan tí at hava hetta í huga.

Við hesi treytaðu tilsøgn ber nú sostatt til at seta eina fyribils loysn í verk. Leysliga mett vil ein detailprojektering kosta uml. kr. 150.000,00.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□arverkfrøðingurin vísa til ískoyti til fundin í teknisku nevnd 4. mars 2010, um manglandi fígging, sum nevndin má útvega áðrenn projektering og bygging verða sett í verk, og til treytaðu tilsøgnina frá Fornminnissavninum um eina fyribils loysn.

Tekniska nevnd 8. apríl 2010: Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, álj. kr. 150.000,-, til at fremja omanfyri nevndu detailprojektering.

Fíggjarnevndin 14. apríl 2010: Samtykt at biðja um tilboð uppá detailprojektering við støði í fyriliggjandi uppskoti. Tilboðið verður at leggja fyri fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. apríl 2010: Kunnað varð um málið.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommunar.

Tekniska nevnd 23. september 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

Fíggjarnevndin 6. oktober 2010: Málið útsett til nærri kanningar og at leggja fyri fíggjarnevndin aftur á fyrstkomandi fundi.

Fíggjarnevndin 17.november 2010: Tekniski stjóri kunnaði um málið. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

Ískoyti:
Umsitingin hevur havt fund við leiðsluna á Tekniska skúla, um at fáa í lag eitt samstarv við skúlan um bygging av viðskiftahúsi í Kirkjubø. Skúlin er sera áhugaður í at luttaka í eini slíkari verkætlan, sum skúlin so eisini vil n▯ta í síni undirvísing fyrra hálvár 2011. Skúlin hevur luttikið í líknandi verkætlanum fyrr – eitt nú í Koltri og á Dímun. Skúlin ynskir tó ikki at standa fyri byggiarbeiðinum, men at okkurt byggivirki stendur fyri hesum, meðan næmingar skúlans luttaka sum arbeiðsmegi í sambandi við byggingina. Skúlin skal ikki hava løn til næmingarnar fyri sína luttøku, men hevur eitt ynski um, at kommunan kann veita ein stuðul til eitt nú lestrarferð hjá næmingum.

Umsitingin hevur viðgjørt ynskini hjá Tekniska skúla, og sær ikki nakran trupulleika í at arbeiðið verður gjørt eftir tí leisti, sum skúlin mælir til. Umsitingin mælir til, at tilboð verða umbiðin frá byggivirkjum uppá byggibúningararbeiði, og at sama virki eisini stendur fyri sjálvum byggiarbeiðinum, við hjálp frá næmingum á Tekniska skúla, sum eisini ger elementir o.a. bygningslutir.

Verætlanin verður fíggjað av avlopi frá lidnum verkætlanum, har avsettar eru kr. 1,0 mió. til verkætlanina, (sí j. nr. 2010-2717).

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til:

1. at heita á fíggjarnevndina um at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum undirlendi til viðskiftahúsið
2. at heimila umsitingini at lata upp í hendi á ráðgeva at gera byggibúningarprosjekt v.m.
3. at heimila umsitingini at gera avtalu við Tekniska skúla um, at teir prosjektera bygningin sum ein timbur-element bygning og gera neyðugu bygningslutirnar í hesum sambandi
4. at kommunan rindar fyri tilfar, ið Tekniski skúlin n□tir til verkætlanina
5. at heimila umsitingini at bjóða byggibúningararbeiðið v.m. út sum undirhondsboð so skjótt avtala er gjørd um undirlendið.

og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

Tekniska nevnd 2. desember 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 8.desember 2010: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 13. desember 2010: Kunnað varð um málið.

Nevndin vísti á manglar so sum handikap-wc, skiftirúm til smábørn o.o. Biðið verður um at síggja endaliga tekning, áðrenn byggingin byrjar.

Ískoyti:
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi upspkoti.

Tilmæli
Tekniski stjórin og b□arverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskotið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011: Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið.

Ískoyti:
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi uppskoti.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna uppskotið.

Tekniska nevnd 10. februar 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og góðkenna fyriliggjandi uppskot og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

44/11 **<u>2010-0169</u>**

Dansk Kaution : Trygd í sambandi við sáttmála við Byggitek um bygging av Kollafjarðar skúla

Lýsing av málinum - samandráttur.
Í sambandið við mál nr. 2005-2180) um fíggjarligu sluttuppgerðina viðv. byggingini av Kollafjarðar skúla, fekk kommunan viðhald í størsta partinum av krøvum sínum í gerðarrættinum, móti búnum hjá Byggitek.

Niðurstøðan hjá gerðarrættinum var, at Byggitek skal rinda b□ráðnum 1.085.000 kr. við procesrentu frá 13. november 2006 umframt sakarkostnað við kr. 253.000 soleiðis at samlaða upphæddin liggur tætt uppat støddini á teirri ábyrgd, sum er stillað í málinum.

Samanlagt fær b□ráðið viðhald í øllum krøvunum móti Byggitek, tó eru einkultir postar niðursettir. Samlaða kravið hjá B□ráðnum verður góðkent við kr. 3.285.200 herundir fær B□ráðið fult viðhald í kravi sínum um fullar dagbøtur uppá kr. 1.596.246.

Kommunan hevur eisini eftirfylgjandi gjørt endaliga uppgerð í samband við krøvini hjá ráðgevanum mál nr. 2005-2458, og góðkendi b□ráðið í okt. 2010 eina semju, har kommunan rindar MAP-arkitektum kr. 1.083.654,- v/mvg til fulla og endaliga avgerð av millumverandi partanna millum.

Í samband við málið móti Byggitek gjørdi kommunan eftir úrskurðin í gerðarrættinum, kravið galdandi móti Dansk Kaution, sum hevur stillað trygd fyri Byggitek, men við re-garantii frá Norðoya Sparikassa.

Dansk Kaution sýtti tó at rinda fullu upphæddina sum gerðarrætturin hevði gjørt úrskurð um, við tí grundgevin, at garantiurin varð niðurskrivaður til 10% tá byggingin varð avhandað kommununi.

Kommunan stevndi síðani Dansk Kaution eftir muninum á kr. 466.432,74, umframt procesrentu frá 12. okt. 2009 og sakarmálskostnaði.

Í skrivi frá 25.01.11, j. Nr. 2010-0169/10 boðar advokatur kommununar frá, at Norðoya Sparikassi, sum hevur veitt re-garanti, hevur vent sær til hansara við uppskotið um, at gera semju um, at teir rinda helvtina av kravinum á kr. 466.432,74, og at kommunan sleppir kravinum um procesrentu og sakarkostnað.

Hin 08.02.2011 hevði stjórnin fund við advokat kommununar um semingsuppskotið, har advokaturin mælti kommununi til at takað av semingsuppskotinum.

Tilmæli:
Stjórnin mælir til, at taka av uppskotinum til semju, har kommunan fær endurrinda kr. 233.216 til endaliga semju í málinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til endaliga semju í málinuml.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

45/11 **<u>2010-0426 KF</u>**

<u>Serstøk byggisamtykt fyri økið til kirkju á Argjum</u>

Lýsing av málinum - samandráttur.
Í februar 2006 kom fyrispurningur frá kirkjuráðnum á Argjum um at finna eitt øki til at byggja nýggja kirkju á Argjum. (mál nr. 2006-0769).

Umsitingin gjørdi eitt uppskot um staðseting av kirkjuni millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sum var samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini.

Av tí at økið liggur tætt við Sandá, var søkt um undantaksloyvi frá friðingarmyndugleikunum til at byggja her.

Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 m^2 av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at øki liggur í D1-øki (*almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt*), ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at fráb□ta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum, sum staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og b□arskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til n□ggja kirkju á Argjum við grundarlagi í teimum tekningunum, sum vóru gjørdar í sambandi við uppskotinum til staðseting av kirkjuni. (mál nr. 2006-0769).

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til n□ggja kirkju á Argjum verður góðkent.

Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 18. mars 2010: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Seinasta freist at mótmæla serstøku byggisamtyktini fyri økið til n□ggja kirkju á Argjum var 3. mai 2010.

Kommunan hevur móttikið 2 mótmæli. Tann eina við 241 undirskriftum og hin við 4 undirskriftum.

Í báðum kærunum verður mótmælt at kirkja verður bygd økinum, sum ætlað er til kirkju á Argjum.

Víst verður á, at økið er sera náttúruvakurt og nógv fólk spáka eftir gøtunum, sum eru gjørdar her og at økið eiður at varðveitast sum eitt petti av nærum óspiltari náttúru mitt í b□num.

Eisini verður víst á, at sambært útstykkingarætlanini Müllerstrøð skuldi økið millum Sandá og Støðlagøtu, skuldi verða fríøki.

<u>Til hetta er at siga:</u>

Í uppskotinum til serstaka byggisamtykt er lagt upp til, at gøturnar í minst møguligan mun verða ávirkaðar av byggingini og har tær verða ávirkaðar skulu n□ggjar gøtur leggjast, soleiðis at møguleikarnir at ganga túr her ikki verða stórvegis ávirkaðir.

Sambært serstøku byggisamtyktini skal byggingin eisini haldast so langt frá Sandá, at áin sjálv ikki skal verða ávirkað.

Framvið niðasta partinum av Sandá er longu bygt sera tætt ánni, men gøtusamband ger tað møguligt at ganga framvið ánni frá Sandagerði og niðan ímóti Havnardali.

Eisini kann vísast á, at tá tað er eina kirkju økið verður lagt út til, verða serlig krøv sett til bygningin og hvussu uttanumøkið verður handfarið.

Tilmæli:
B□ararkitekturin mælir til at halda fast um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til n□ggja kirkju á Argjum vísandi til omanfyrinevnda.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010: Nevndin samtykti at fara á ástaðarfund.

Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010: Nevndin var á ástaðarfundi. Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jan Christiansen og Levi Mørk samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jógvan Arge tekur støðu á einum seinri fundi.

Býráðið 24. juni 2010: Málið beint í byggi- og b□arskipanarnevndina.

Ískoyti:
Mál til umrøðu.

Jan Christiansen var ikki við til hetta málið.
Elin Lindenskov var við til hetta málið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2010: Málið varð umrøtt.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at halda fast um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til n□ggja kirkju á Argjum vísandi til omanfyrinevnda.

Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011:
Ein meiriluti: Elin Lindenskov, Levi Mørk og Jóvan Arge samtyktu ikki taka undir við tilmælinum um uppkoti til serstaka byggisamtykt fyri økið.

Ein minniluti: Bogi Andreasen og Jan Christianssen taka undir við tilmælinum. Jan Christianssen krevur málið í b□ráðið vísandi til at málið kemur úr b□ráðnum.

Býráðið 24. februar 2011: Atkvøtt varð um minnilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jákup Símun Simonsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Inga Dahl

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Fr□dal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

46/11 **2006-0428**

Umsókn frá Maritu Joensen um at broyta byggisamtyktina fyri tann partin av matr. nr. 166 og 168a, Argir, sum liggur í 4. grundumráði til A1-bústaðarbygging.

Lýsing av málinum - samandráttur:
Ognirnar matr. nr. 166 og 168a, Argir, eru ávíkavist 3.671 m^2 og 7.546 m^2 til støddar harav uml. 2/3 liggja sum A1-bústaðarøki og 1/3 sum 4. grundumaði.

Ognirnar liggja við Traðagøtu niðan til bøgarðarnir niðanfyri Glyvursveg og beint eystan fyri Hagagøtu.

Tilmæli
B□ararkitekturin mælir til at málið verður tikið upp í sambandi við eini gjøgnumgongd av byggisamtyktini fyri Argir.

Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti.
2. apríl 2008 kom n□ggj ummsókn frá eigarinum av ognunum matr. nr. 166 og 168a, saman við eigarinum av grannaognini matr. nr. 156a, Argir um at broyta byggisamtyktina fyri tann partin av ognunum sum liggur í 4. grundumráðið til A1 bústaðarygging.

Saman við umsóknini um broyting av byggisamtyktini er ein útstykkingarætlan av ognunum, sum tilsamans eru 18.000 m^2. Ætlanin er at útstykkja 6 grundstykkir til tvíhús og 13 grundstykkir til stakhús.

Innkoringin til útstykkingina er frá Traðagøtu beint yvirav Rosságøtu.

Umsóknin er deild upp í tvey ymisk mál. Tað eina er ein umsókn um broyting av byggisamtyktini frá 4. gr. til A1-sethúsaøki og hitt er um góðkenning av eini útstykkingarætlan, sum partvís liggur í 4. gr.

Umsóknin skal viðgerast eftir hesum leisti.

> -Málið um broyting av byggisamtyktini skal viðgerast av b□arskipanardeildini og leggjast fyri byggi- og b□askipanarnevndina.
>
> -Málið um útstykkingarætlanina skal viðgerast av byggideildini viðv. skipan av økinum v.m. av økinum og teknisku deild viðv. tilkoyring til útstykkingina, tekniskar leiðingar og vegir v.m.

Málið er ikki liðugt viðgjørt í umsitingini.

Tilmæli
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at málið verður útsett vísandi til at tað ikki er búgvið til støðutakan.

Byggi- og býarskipanarnevndin 27. oktober 2008: Nevndin samtykti at umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini til næsta fund.

- Umsitingin hevur gjørt uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 166, 168a og 156a, Argir.

Tilmæli
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagf. 20.11.2008.

Byggi- og býarskipanarnevndin 8. desember 2008: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í b□ráðið.

Býráðið 29. desember 2008: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ískoyti:

20. november 2009 kom avslag frá Innlendismálaráðnum um ætlaðu broytingina av byggisamtyktini fyri matr. nr. 166, 168a og 156a á Argjum, vísandi til at lendið er brætt og skapið av økinum, sum verður lagt afturat tykist tilvildarligt.

B□arskipanardeildin hevur gjørt eitt n□tt uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri eitt størri øki.

Hetta uppskotið er at víðka A1-økið niðan ímóti grótgarðinum frá Tváta til og við verandi sethúsabygging við Hagagøtu.

Við hesum uppskotinum eru møguleikarnir til vegager munandi betur og verandi sethúsabygging við Hagagøtu, sum í dag liggur í 4. grundumráði, kemur eisini at liggja í A1-økinum.

Tilmæli
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagf. 31. Januar 2011.

Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

FUNDUR LOKIN KL. 20:40

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ **24. februar 2011**	Blað nr.: **8940**
	Formansins merki:

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

Jógvan Arge	Inga Dahl	Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal	Halla Samuelsen	Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein	Vagnur Johannesen	Levi Mørk
Rúni Djurhuus	Jákup Símun Simonsen	Jan Christiansen
	Heðin Mortensen	